# Samskipari
## til Vinnuframagrunnin



Vinnuframagrunnurin sóknast eftir samskipara at standa fyri umsitingini av fjøltáttaða virkseminum hjá Vinnuframagrunninum.

Sum samskipari ert tú tað neyðuga millumliðið millum umsøkjarar við tí góða hugskotinum og stýrið, ið tekur avgerðirnar um, hvussu tær 5 mió kr. hvørt ár verða býttar millum tær mongu og áhugaverdu umsóknirnar um stuðul.

### Uppgávur

Sum samskipari hjá Vinnuframagrunninum skalt tú:

- vera við til at menna íverksetaraumhvørvi kring landið
- duga at fáa eyga á tey góðu hugskotini
- marknaðarføra møguleikarnar, sum Vinnuframagrunnurin bjóðar
- samstarva við stýrið fyri Vinnuframagrunnin um eina góða og gjøgnumskygda viðgerð av øllum umsóknum
- standa fyri skrivstovuhaldinum hjá umsitingini
- svara fyrispurningum og vegleiða fólki í at skriva umsóknir
- finna rættar metarar til umsóknir
- røkja heimasíðuna vfg.fo og Ráðgevarabankan
- gera kunnandi og upplýsandi arbeiði kring alt landið um møguleikar og virksemið hjá Vinnuframagrunninum
- hava eftirlit við játtaðum umsóknum
- hava eftirlit við játtanini hjá Vinnuframagrunninum

Harumframt fært tú ábyrgdina av øllum teimum mongu, ymisku uppgávunum, sum alla tíðina stinga seg upp.

Rætti persónurin er fyrikomandi, dugir væl at samskifta, orðar seg lættliga, og er sinnað/ur at veita øllum ta bestu tænastuna, um tað so er smiðurin úr Sandavági ella sniðgevin av Skála, sum skal hava ráðgeving. Hon/hann skal hava góð samstarvsevni, innlit í fíggjarstýring og gott innlit í føroyska vinnulívið og í nýskapan og íverksetan. Evnini at síggja ta stóru myndina eru eisini týdningarmikil.

Talan er um ¾ starv. Lønin sambært avtalu við grundarlagi í sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Vilt vita meira, ber til at ringja til Regin W. Dalsgaard, formann í stýrinum fyri Vinnuframagrunnin, telefon 596061.

Umsóknin skal sendast til Vinnuframagrunnin, stílað Regini W. Dalsgaard, stýrisformanni, postboks 3079, FO-110 Tórshavn. Eisini ber til at senda umsóknina við t-posti til vfg@vfg.fo.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. januar 2010.

Les meira um Vinnuframagrunnin á www.vfg.fo

Vinnuframagrunnurin | Hoyvíksvegur 51 | Postboks 3079 | 110 Tórshavn
Tel 31 27 94 | Faks 31 67 03 | vfg@vfg.fo | www.vfg.fo

Vinnuframagrunnurin




*Bókarøðin um Havnar søgu telur nú fimm bøkur, ið føra okkum frá landnámi og fram til 1909, tá Havnin gjørdist fólkavald kommuna*